## Espanyol vann á Barcelona



Lítlibeiggi sigraði á stórabeiggja, tá tey bæði feløgini úr Barcelona, FC Barcelona og Espanyol, brustu saman í grannauppgerðini í vikuskiftinum. Dysturin var leiktur á heimavøllinum hjá Espanyol, og áskoðararnir blivu vitnir til ein sera góan fótbóltsdyst. Luis Garcia legði uppiborið Espanyol á odda 1-0. Um miðjan seinna hálvleik javnaði Saviola fyri Barcelona, men ístaðin fyri at geva upp valdi Espanyol at kempa víðari, og hetta gav úrslit. Móti endanum fingu teir tvey mál aftur, sum Raul Tamudo og Rufete skoraðu, og sostatt vann Espanyol slagið um Barcelona ímóti stórabeggjanum, FC Barcelona.

## Fyrsti ósigur til Juventus

Juventus rendi seg í sín fyrsta ósgiur í næstbestu deildini í Italia, tá teir møttu Mantova á útivølli. Úrslitið gjørdist 1-0 til Mantova, og hetta var ikki bert fyrsta tapið hjá Juventus. Hetta var eisini fyrstu ferð í hesum kappingarárinm, at Juventus mátti fara av vøllinum uttan at hava skotið nakað mál. Tapið ber við sær, at Juventus er dottið niður á 6. pláss í Seriu B, har Mantova við sigrinum fór fram við stórfelagnum.

Kyndil-Neistin 35-30 (20-16):

# Kyndil vann slagið um Havnina

**Kyndil vann seg av aftasta plássi, tá teir vunnu tryggan sigur í grannuppgerðini ímóti Neistanum í Atlantic Airways deildini sunnudagin. Við sigrinum hava teir lagt seg undir liðina á Neistanum**

HONDBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Bæði Kyndil og Neistin fingu eina heldur keðiliga byrjan uppá endaspælið í Atlantic Airways deildini hjá monnum. Kyndil var á vitjan í Hoyvíkshøllini hjá botnliðnum, H71, og her eydnaðist hoyvíkingum at vinna dystin. Neistin hevði heimavøll ímóti hinum botnliðnum, KÍF, og eisini teir máttu lúta fyri kollfirðingunum.

Sostatt vóru tað tvey lið, sum skuldu royna at fáa vind í aftur seglini, sum møttust í grannuppgerðini í høllini á Hálsi sunnudagin. Undan hesum dystinum hevði Neistin havt takið á Kyndli í hesum kappingarárinum við einum sigri og einum javnleiki, og tí hevði Kyndil nú møguleikan at fáa sín fyrsta sigur á Neistanum í hesum kappingarárinum.

### Kyndil dró frá síðstu minuttirnar

Í fyrra hálvleiki var næstan alt, sum bendi á, at áskoðararnir fóru at vera vitni til ein sannan gysara í grannauppgerðini millum Kyndil og Neistan. Fyrstu løtuna fylgdust liðini væl at, og sjálvt um Neistin helst var heldur oman á, so var munurin ongantíð meir enn 2 mál á liðunum.

Spælið var eisini til tíðir skjótt og gott, og hetta gjørdi, at fólk fingu valuta fyri pengarnar. Spælið gekk skjótt frá enda í annan, og hetta gjørdi, at liðini fingu nógv mál í fyrra hálvleiki.

Tá fimm minuttir restaðu av fyrra hálvleiki, stóð enn á jøvnum ímillum liðini, men so tók Kyndil veruliga dik á seg. Síðstu løtuna av fyrra hálvleiki skoraðu teir fimm ferðir, meðan Neistin bert fekk eitt mál.

### Kyndil varðveitti leiðsluna

Høvdi liðini fylgst væl at at kalla allan fyrra hálvleik, so leyp Kydil avstað fyrstu løtuna av seinna hálvleiki. Eftir 10 minuttir høvdu teir økt um leiðsluna, soleiðis at teir nú vóru heili 6 mál frammanfyri, og nú sá ikki gott út hjá Neistanum.

Brádliga byrjaðu leikararnir hjá Neistanum at gera um seg. Teir tóktust síggja veruleikan í eyguni, og teir byrjaðu at leggja Kyndil undir eitt ávíst trýst. Eitt mál fyri og annað mál eftir bleiv tikið av kyndilsleiðsluni, og knappliga vóru aftur bert tvey mál á muni. Nú var dysturin púra opin, men so kúvendi aftur.

Næstu langu løtuna steðgaði fullkomiliga upp aftur hjá Neistanum, og hesa løtuna gagnnýtti Kyndil til at avgerða dystin. Teir megnaðu at vinna sær eina 6 mála leiðslu, og so var dsturin í roynd og veru avgjørdur, tí nú vóru bara knappir 10 minuttir eftir at leika.

Kyndil megnaði eisini at varðveita leiðsluna, soleiðis at tryggi sigurin varð fingin til høldar. Við sigrinum hevur Kyndil vunnið seg av aftasta plássi, og nú hava teir lagt seg undir liðina á grannunum úr Neistanum á stigatalvuni.



*Kyndil vann slagið um Havnina, tá teir møttu Neistanum í Atlantic Airways deildini. Við sigrinum hava teir nú lagt seg undir liðina á Neistanum á stigatalvuni*

### FAKTA

**Kyndil-Neistin 35-30 (20-16)**
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Janus Einar Sørensen 8 (1), Rókur Akralíð 7, Høgni Klein 6 (2), Ragnar Stakksund 5, Kenn Zachariassen 4, Hans Áki Dal Christiansen 3, Hanus Johansen 1, Hjalti Jacobsen 1
**Neistin:** Blagoje Buha 7 (2), Carl Herup Olsen 7, Tróndur Kragesten 4, Birgir Poulsen 4, Jugoslav Djumic 3, Áki Mørk 3, Roar Dalsgarð 2
**Brotskøst:** Kyndil 7, Neistin 2
**Útvísingar:** Kyndil 2, Neistin 6
**Dómarar:** Hannis Wardum & Uni Wardum

# Svimjikapping í Vági

**Svimjarar fingu gullnálir, okkurt føroyskt met var sett, meðan aðrir svimjarar svumu undir kravtíðirnar til Oyggjaleikirnar í svimjikapping í Vági, sum hevur verið síðstu tvey vikuskiftini**

SVIMJING

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Síðstu tvey vikuskiftini hevur svimjihøllin í Vági verið karmur um svimjikapping, har fleiri føroyskir svimjarar hava fingið stak góð úrslit.

Kappingin fekk eina avbera góða byrjan síðsta vikuskiftið, tá tveir svimjarar úr Tvøroyrar Svimjifelag vunnu sær gullnál. Talan var um Juttu Thomsen og Monu Simonsen, sum báðar fingu gullnál á teininum 1500 m frí. Bæði Jutta og Mona svumu undir fyrrverandi føroyska metið, men av tí at Jutta var eitt vet frammanfyri Monu, so er tað hon, ið eigur nýggja føroyska metið.

### Shaila til Oyggjaleikirnar

Var byrjanin á kappingini góð fyrsta vikuskiftið, so helt henda gongdin fram seinna vikuskiftið.

Shaila Millum Garðarnar frá Tvøroyrar Svimjifelag hevur í kappingini klárað kravtíðina til Oyggjaleikirnar komandi summar, og hetta verður sostatt fimta ferðin, at hon skal taka lut á Oyggjaleikunum.

Pál Joensen frá Vágs Svimjifelag svam seg eisini fram til føroyskt met á teininum 1500 m frí. Hann kom á mál í tíðini 15.56.21, og sostatt gjørdist hann fyrsti føroyingurin, sum svam henda teinin undir 16 minuttir, og tað er eitt sera flott úrslit av honum.

### Met blivu sett – nálir vunnar

Umframt føroysku metini hjá Juttu Thomsen og Pál Joensen á ávikavist 800 m frí og 1500 m frí, so vóru eisini fleiri bólkamet sett í kappingini í Vági.

Pál Joensen setti m.a. bólkamet á teininum 100 m firvald í bólki 5 við tíðini 1.00.10, men eisini Høgni Minét Rasmussen úr Havnar Svimjifelag setti okkurt bólkamet. Á teininum 1500 m frí setti Høgni bólkamet í bólki 4 við tíðini 17.21.10, og eisini á teininum 400 m frí setti hann bólkamet í bólki 4 við tíðini 4.21.78.

Kravið til luttøku í FM er bronsunál, og onkrir svimjarar vunnu sær eisini bronsunál í kappingini í Vági. Jan Hofgaard frá Tvøroyrar Svimjifelag vann bronsunál á teininum 50 m bringa í tíðini 0.38.80. Afturat honum vann eisini Sofus Beck úr Vágs Svimjifelag bronsunál. Hann vann á teininum 50 m frí í tíðini 0.31.31.

Næsta svimjikapping verður á Toftum 20. januar fyri bólkarnar 1 og 2.

**Heiðursmerkjabýtið**

| Felag | Gull | Silvur | Bronsu |
|---|---|---|---|
| Tvøroyrar Svimjifelag | 11 | 10 | 6 |
| Vágs Svimjifelag | 8 | 1 | 8 |
| Flot | 7 | 7 | 4 |
| Fuglafjarðar Svimjifelag | 4 | 1 | 2 |
| Havnar Svimjifelag | 1 | 4 | 1 |
| Ægir | 0 | 4 | 5 |